# Oddagrein

Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo



# NIÐURLEGGJA SMÁAR SKÚLAR

Sjey smáir bygdarskúlar verða niðurlagdir í summar. Soleiðis skrivaðu vit í gjár, eftir at innskrivingarnar til komandi skúlaár eru greiðar. Deildarstjórin í fólkaskúladeildini í Mentamálaráðnum segði, at orsøkin bara partvís er, at eingi skúlabørn eru eftir í bygdunum. Orsøkin er eisini, at foreldur hava ynskt at flyta børn síni úr smáum bygdarskúlum í størri skúlar í grannabygdum. Deildarstjórin metir eisini, at fleiri bygdarskúlar fara at hvørva í framtíðini.

Gamalt var, at skúlin var mentanarstovnurin í bygdini. Fór skúlin, stóð bygdin fyri falli. Men soleiðis er ikki longur, nú vit hava minkað so nógv um landið við væl útbygda undirstøðukervinum. Vit hava brúkt hundraðtals milliónir til góðar vegir og tunlar gjøgnum fjøll og undir firðir – og tað er eyðsæð, at hetta má síggjast aftur í rakstrarligum rationaliseringum. Men tað ger tað ikki í nóg stóran mun.

Tað eru ikki nógvir mánaðir síðani, at Helena Dam á Neystabø proklameraði sín politikk um at skipa landið í sjey skúlaøki – sum fór at bera í sær, at smáu skúlarnir fóru at hvørva. Føroya Lærarafelag tók undir við hesi ætlan, tí lyftið var, at spardi peningurin skuldi varðveitast innan skúlans gátt – ella við øðrum orðum, at spardi peningurin fór at føra til dygdarbetri skúlar.

Tað er eftir hondini breið semja um, at smáu bygdarskúlarnir ikki eru pedagogiskt besta loysnin – samanhildið við dýra raksturin fyri hvønn næming, tá lærari kann telja næmingar sínar á aðrari hondini. Tað sigur seg sjálvt, at tá vit upp á fáar minuttir kunnu flyta næmingarnar til størri skúlar – so at siga uttan eykaútreiðslu, so eigur hetta at verða gjørt.

Men tað er stórt spell, at lyftið um ikki at taka pengarnar frá skúlanum, verður brotið. Øll duga at síggja, at tað valla eru pengar til at økja samlaðu játtanina til skúlaverkið – men hví ikki lata skúl-



an varðveita ta játtan, hann hevur, og lata sparingar og rationaliseringar koma skúlaverkinum til góða?

Besta loysnin er uttan iva at savna næmingar í hóskandi stórar skúlar á hóskandi økjum. Tí er verandi gongd – við at smáu skúlarnir fækka – uttan iva tann rætta, tó at motivið ikki er tað rætta. Men tað skal ein ávís støðd av skúla til tess at næmingurin fær besta tilboðið, og tað er jú sakin í einum nøtuhylki!

Øll vita, at sparingar í fólkaskúlanum fara at ganga út yvir veikastu næmingarnar - men tað tykist so kyniskt, at okkara kosnu menn og kvinnur tykjast góðtaka tað.

## Spardi peningurin skuldi varðveitast í skúlanum

## Goysti 300 mill. tons upp í loft

Nú gosið við Eyjafjallajøkull er minkað burtur í at kalla einki, eru íslendsku jarðfrøðingarnir farnir at kanna, hvussu nógv kom upp úr gosopinum tær vikurnar, sum gosið vardi.

– Tað er komið meiri upp úr hesum gosinum enn tí gosinum, sum var í Heklu í 1947, og tað bleiv hildið vera eitt stórt gos. Í veruleikanum er hetta gosið størri, enn eg helt, sigur jarðfrøðingurin Reynir Bödvarsson, sum starvast á lærda háskúlanum í Uppsala, við svenska útvarpið.

Hann sigur, at 300 milliónir tons av øsku er komin úr gosinum við Eyjafjallajøkull.

– Stundum hevur tað verið so ógvusligt, at tað, sum kom upp um sekundið, vigaði líka nógv sum 100 persónbilar, sigur jarðfrøðingurin.

Íslendskir jarðfrøðingar hava sagt, at gosið kann gott kykna aftur, og Reynir Bödvarsson sigur tað sama.





## Propaganda frá Øgendahl

Danski standiskemtarin Mick Øgendahl vitjar í Føroyum næsta vikuskiftið. Hann fer at undirhalda í Norðurlandahúsinum 4. juni, og tá kunnu fólk vænta sær eitt væl umtókt og frískt show frá Øgendahl.

Seinasta árið hava 50.000 danir keypt atgongumerki til Propaganda-showið hjá Mick Øgendahl, og samanlagt hevur hann 80 framførslur á skránni í hesum árinum.

– Eg eri sera takksamur fyri, at fólk taka so væl ímóti showinum, sum eg havi arbeitt við í eitt heilt ár. Eg havi tað fantastiskt á pallinum, og tá fólk í so stórum tali koma til mínar framførslur, er tað trupult at verða í ringum lag, sigur Mick Øgendahl.



## Tøkk til Rituna

T. M. SMITH
KJAK Á SÍÐU 12



## Trygg KT-skipan

TÍÐINDASKRIV Á SÍÐU 12



## Hera Bjørk kom víðari

Í gjárakvøldið var fyrsta undanfinalan í Grand Prix. 17 lond kappaðust um 10 pláss í finaluni leygarkvøldið. Íslendska Hera Bjørk eydnaðist, at koma víðari.

Finland noyddist tó heimaftur uttan finalupláss.

Hóskvøldið er næsta undanfinalan og tá kappast Danmark og Svøríki. Norra, ið er vertland í ár, hevur longu tryggja sær pláss í finaluni.

Hesi londini komu víðari:

Ísland
Bosnien-Herzegovina
Moldova
Russland
Grikkaland
Portugal
Hvitarussland
Serbia
Belgia
Albania

Sosialurin

Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*